B68–GÍ 3–2 (2–1):

# B68 greiddi sín setning

**Málmøguleikarnir vóru nógvir, tá ið toftamenn fyri fyrstu ferð í fjúrtan ár vunnu á heimavølli ímóti GÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

B68 gjørdi tað, sum stóð í teirra makt fyri at varðveita spenningin um meistaraskapin. Fyri fyrstu ferð í fjúrtan ár fingu teir fult á heimavølli ímóti GÍ, sum – hóast teir hava havt mótgongd mest sum alt kappingarárið, og hóast Popczynski enn eina ferð noyddist at taka seg burturúr, tá ið ein hálvur tími var farin – hevði fleiri málmøguleikar. Men Albert Sævarsson var enn eina ferð stinnur síðsti skansi, tá ið miðvallarin í vinstru, Símun Samuelsen, og álopsmenninir Bárður á Lakjuni og Magnus Skoralíð royndu seg.

Spælið var í longum løtum rættuliga rótut. Tað komst av, at tað mesta gekk fyri seg á rættuliga lítlum øki. GÍ verjan lá rættuliga frammarlaga, og teir á heimaliðnum royndu seg eisini ofta við rangstøðufelluni. Tað hevði nógv fríspørk við sær, men onkra ferðina kiksaði fellan, og so varð álitið sett á málverjarnar báðar.

Tey, sum vóru fimm minuttir ov sein, sóu ikki tvey tey fyrstu málini. Í 2. minutti setti Hans Fróði Hansen hol á við stútara eftir ógvuliga langt innkast frá John Hera Dam, og Áslakur R. Petersen javnaði við skoti úr rættuliga spískum í høgru.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki legði heimaliðið seg fram um aftur. John Heri Dam, sum hesa ferð mannaði B68 álopið saman við Súna Fríða Johannesen, tiltuskaði sær eitt fríspark 25 metrar úr málinum. Hann royndi sjálvur undan lítla lotinum, Hallur Hansen tveitti seg, men megnaði bara at hálvbjarga, og Eyðstein Skipanes, sum fyri fyrstu ferð á árinum var ímillum teir fyrstu ellivu hjá B68, var fyrstur á returbóltinum.



*Tað eydnaðist B68 at vinna fyrsta heimadystin á GÍ í 14 ár, og við sigrinum lyftu toftamenninir seg upp á silvurplássið í landskappingini*

*savnsmynd*

### Stórt fýrverkarií

B68 hevur havt tiltikna verju mesta partin av árinum. Tær síðstu ferðirnar eru meskarnir víðkaðir. Tað fóru tvey mál ígjøgnum ímóti HB, og aftur hesa ferð fóru tvey mál ígjøgnum.

Fróði Benjaminsen var leikbannaður, og Øssur Hansen var skaddur. Tí var neyðugt við nýggjari manning. Dánial Hansen varð fluttur úr verjuni og á miðvøllin, meðan Jóhan Petur Poulsen varð vongverji í høgru. At broytingarnar vóru so stórar tóktist órógva ikki so lítið. Tvær ferðir var um reppið, at B68 gávur bóru GÍ mál við sær. Eina ferð fekk Símun Samuelsen bóltin frá Jann Inga Petersen, og Albert bjargaði framúr væl, og eina aðra ferðina var tað Albert, sum legði fyri føturnar á Bárði á Lakjuni, sum sendi í aftur krovið á málverjanum.

Í hinum endanum vóru eisini vandamiklar støður. Jóhan Petur Poulsen sendi dygst framvið úr støðu, tá ið hann kanska átti at havt lagt innfyri, har tríggir liðfelagar bíðaðu, John Heri Dam spurtaði ígjøgnum í vinstru, men Hallur Hansen bjargaði, og Bogi Petersen stríddi seg ígjøgnum miðverjuna eftir diagonalsending úr vinstru, men royndin fór við síðuna av málinum.

Í næststíða minuttinum av vanligu leiktíðini staðfesti innskifti Øssur Jacobsen, at øll stigini skuldu verða á Svangaskarði. Hann slapp undan rangstøðufelluni, dró eitt sindur og smekkaði so knappliga til. Dómarin legði fýra minuttir afturat vanligu leiktíðini, og tá ið stóri vísarin var á veg runt síðstu ferð setti Bartal Eliasen fríspark úr 16,3 metrum fram við manngarðinum og dygst inn við málstólpanum. Tá var Jóhan Petur Poulsen á veg undir tak, tí hann hevði fingið reytt kort orsaka av neyðbremsu.

Gøtumenn tevjaðu javnleikin, teir ætlaðu at skunda sær, men tíðin var farin, og harvið hevði B68 fingið fyrsta sigurin á heimavølli ímóti GÍ í sekstan ár.

### Dysturin í tølum

**B68–GÍ 3–2 (2–1)**
1–0: Hans Fróði Hansen 2.
1–1: Áslakur R. Petersen 4.
2–1: Eyðstein Skipanes 25.
3–1: Øssur Jacobsen 74.
3–2: Bartal Eliasen 90.
Dómari: Páll Augustinussen

B68: Albert Sævarsson – Jóhan Petur Poulsen, Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen, Arnbjørn Danielsen – Bogi Petersen, Dánial Hansen, Jann Ingi Petersen, Eyðstein Skipanes – Súni Fríði Johannesen, John Heri Dam (Øssur Jacobsen, 74.)
Gult kort: Arnbjørn Danielsen 52.
Reytt kort: Jóhan Petur Poulsen 90.
GÍ: Hallur Hansen – Bartal Eliasen, Kaj Ennigarð, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen (Jonreid Dalheim, 74.), Áslakur R. Petersen, Zdzislaw Janik, Símun Samuelsen – Krzystof Popczynski (Magnus Skoralíð, 32.)
Gult kort: Hans Pauli Petersen 61.

LÍF-ÍF 2-0 (1-0):

# Aftur mannfall í grannastríðnum

2. DEILD
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Á varmakeldu kókaði tað, tá ið LÍF vitjaði í Fuglafirði. Leirvíkingar kendu seg snýttar fyri mál í síðstu løtu og harvið javnleik, og ÍF misti ein mann. Leygardagin vóru longu uppfluttu fuglfirðingarnir í Leirvík, har tað vóru níggju grønir og tíggju reyðir á vøllinum, tá ið dómarin bríksladi fyri síðstu ferð.

Vísarin var ikki komin runt fyrstu ferð, tá ið Kaj Eli Olsen hevði lagt heimaliðið framum. Petur Sjúrðarberg royndi seg, Fróði Poulsen bjargaði, og veteranurin var fyrstur á returinum.

ÍF hevði sínar møguleikar at javna. Hanus Eliasen mundi hava tann besta, tá ið hann eftir at hava sneitt framvið fleiri setti við síðuna av málinum. Fuglfirðingar vóru undirmannaðir frá miðskeiðis í fyrra umfarinum, tá ið vongverjin í høgru, Sverri Ellingsgaard, sá reytt, eftir at hann hevði nýtt neyðbremsuna. Men hóast ÍF var undirmannað, so vóru teir rættuliga væl við.

LÍF misti tveir menn miðskeiðis í 2. hálvleiki. Kaj Eli Olsen fekk beinleiðis reytt. Eftir nærdyst við Jan Skoradal takkaði hann tvær ferðir fyri. Fyri fyrru tøkkina fekk hann reytt, og nú er tað upp til FSF at taka støðu til, hvat sektin skal vera fyri seinnu hevndina.

Tríggjar minuttir seinni sá Petur Sjúrðarberg seinna gula kortið, og so stóð nógv á hjá LÍF. Høgni Zachariasen hjá ÍF hevði góða frísparksroynd, sum Allan Joensen bjargaði, og hann hevði eisini góða bjarging, tá ið fuglfirðingar stútaðu eftir hornaspark.

Uppgerðin reið um snarið, men hóast teir vóru undirmannaðir, so vóru tað teir á heimaliðnum, sum skoraðu og harvið staðfestu rættuliga týdningarmikla sigurin. Miðvallarin í vinstru, Símun Waag Høgnesen, skrúvaði úr høgru skrúvaði fríspark í handara síðunetið. Tá var eitt korter eftir, og teir níggju á LÍF liðnum megnaðu at halda tætt.

Fyri LÍF var talan um sera týdningarmiklan sigur, men teir eru framvegis ikki væl fyri. Um teir skulu sleppa undan at spæla um plássið í næstbestu deildini, so skulu teir vinna í síðsta umfarinum, tá ið teir skulu spæla í Vági. Um teir fáa øll stigini, so fara teir at trýsta VB niður um strikuna.

ÍF skal í vikuni savna kreftir og huga um heimadystin ímóti Sumba. Í fjør tóku fuglfirðingar eitt sindur av uppflytingar glansinum av FS Vágum, tá ið teir á heimavøllinum í Fuglafirði vunnu í síðsta umfarinum, áðrenn FSV fekk gullkrónurnar. Tað vilja teir í ÍF neyvan skal ganga út yvir teir sjálvar hesa ferð.



KÍ-NSÍ 2-2 (2-2):

# Lunkað kensla við Djúpumýru

**Við javnleikinum staðfesti NSÍ, at teir verða nummar fýra í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Runavíkingar vitjaðu í Klaksvík sunnudagin í einum av teimum dystunum, sum á pappírinum ikki høvdu tann heilt stóra týdningin. Gaman í kundu runavíkingar við einum sigri framvegis halda lív í vónini um heiðursmerki, men tað treytaði so samstundis fleiri aðrar lutir. So alt í alt mundu runavíkingarnir ikki hugsa so nógv um hendan møguleikan. Heldur ráddi tað hjá teimum um at staðfesta støðuna á talvuni, soleiðis at KÍ ikki fær teir aftur, og so annars vóna, at tað skuldi eydnast HB at taka gullið í Gundadali, soleiðis at Toto-plássið fall til Runavíkina.

Og hetta seinasta eydnaðist. Runavíkingar fingu við einum javnleiki staðfest, at teir verða ikki tiknir av KÍ, og tá HB so samstundis vann gullbrakið, so er tað greitt, at tað verður NSÍ, sum skal spæla Totobólt næsta kappingarár.

At talan kanska var um ein av teimum meira týdningarleysu dystunum, sást partvíst eisini í Klaksvík. Serliga í fyrra hálvleiki vóru eftiransingarnar ikki nóg avgjørdar, og tað viðførdi, at álopsleikararnir til tíðir fingu hampuliga langt tjóður. Í spælinum á vøllinum var tað kanska NSÍ, sum hevði yvirvágina, men klaksvíkingar vóru tó ikki fyri ongum, og teir høvdu so eisini sínar møguleikar.

NSÍ hevði tó ein risastóran av slagnum, tá Helgi L. Petersen kom púra leysur móti málverjanum, men tá hann skuldu rulla tvørturum, sendi hann beint til Jan Andreasen hjá KÍ. Og ístaðin vórðu tað so teir á heimaliðnum, sum løgdu seg á odda. Arnold Joensen sendi hornaspark innfyri, har Ove Nysted var hægstur, og við einum góðum stútara sendi hann niður í vøllin og í málið.

Hetta fekk runavíkingar at rakna nakað við, og næstu løtuna var talan um veruligt trýst á KÍ málið. Ein røð av hornaspørkum spurdist burturúr, og tað var eftir eitt av hesum, at Sjúrður Jacobsen fekk javnað, eftir at KÍ-verjan ikki megnaði at rudda burtur í trunkaspælinum.

Men klaksvíkingar svaraðu skjótt aftur. Aftur hesa ferð var tað Arnold Joensen, sum var upp á spæl. Í tveimum royndum fekk hann beint bóltin innfyri til ein púra blankan Hjalgrím Elttør. Toppskjúttin í deildini heilkiksaði tó, tá hann skuldi stúta bóltin inn, men við handaru stong stóð ein eins leysur Atli Danielsen, og hann kundi uttan stórvegis trupulleikar senda bóltin í málið.

Fjórða málið fyri steðgin var úrslit av heldur jánkasligum KÍ-spælið. Fyrst mistu teir bóltin í uppspælinum, og tá ein langur bóltur so varð sendur inn um verjuna, heilkiksaði verjuleikari, tá vandin skuldi stútast burtur, og so kundi Karsten From við høvdinum lyfta bóltin upp um Karsten Joensen til 2-2.

Um liðini bæði vóru nøgd við hetta, skal vera ósagt, men í seinna hálvleiki var als ikki sama ferð yvir spælinum. Ansingarnar vóru framvegis dekan ov leysar, men í stóran mun gekk spælið nú so seint fyri seg, at hetta ikki kostaði stórvegis.

Tað var tó um reppið, at KÍ fekk øll stigini, tá Hjalgrím Elttør í yvirtíðini stóð mest sum leysur í brotsteiginum, men Jens Martin Knudsen vardi meistarliga fyri teirri royndini, og so hendi ikki stórt meira.

Við javnleikinum fekk NSÍ sum sagt staðfest, at teir aftur komandi árið skulu vera partur av føroysku umboðanini í altjóða fótbólti. Eitt úrslit, sum kanska ikki er so galið, men yvir alt árið man tað tó vera eitt vónbrot fyri NSÍ, at teir snávaðu so illa í seinastu og avgerandi dystunum.

Hjá KÍ er enn ikki greitt, hvørt talan verður um fimta ella sætta pláss hetta árið, men tað man sum so vera líkamikið. Hinvegin mundi tað kennast tungt, at HB við sínum sigri skuldi koma ájavnt KÍ í meistaraheitum. KÍ verður hundrað ár í komandi ári, og einki er at ivast í, at tað í vetur fer at verða lagt nógv fyri í royndunum at styrkja hópin, so dagurin kann haldast ovast á fótbóltstindunum. Hinvegin verður HB eisini hundrað, og so er spurningurin, um teir tá fara at leggja seg einsamallar á alltime listanum. Og so er sjálvandi eisini møguleiki fyri, at okkurt triðja lið fer avstað við øllum, men tað fara vit so uttan iva at hoyra meira um til ta tíð.



*Atli Danielsen og Sjúrður Jacobsen komu báðir á málskjúttarlistan sunnudagin, men alt í alt man hvørgin teirra tó vera heilt nøgdur við kappingarárið sum so*

*Mynd: SáH*

### Dysturin í tølum

**KÍ-NSÍ 2-2 (2-2)**
1-0: Ove Nysted
1-1: Sjúrður Jacobsen
2-1: Atli Danielsen
2-2: Karsten From
Dómari: Oddmar Andreasen

KÍ: Karsten Joensen – Leon Bjartalíð, Jan Andreasen, Ove Nysted, Símun Joensen – Arnold Joensen, Atli Danielsen, Allan Joensen, Eyðun Klakstein – Hjalgrím Elttør, Alexander Djordjevic
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Kári Hansen, Andy Olsen – Helgi L. Petersen, Karsten From

B68-B71 0-4 (0-0):

# B71 bjargaði sær

2. DEILD B68–B71
*Jóannes Hansen*

Tað gingu trý korter, áðrenn B71 kom á glið. So var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi vera. Sandoyingar vunnu 4–0 á Svangaskarði, og harvið fingu teir tey trý stigini, sum høvdu við sær, at teir so at siga hava tryggjað sær eitt ár afturat í næstbestu deildini. Leygardagin fáa teir vitjan av TB, sum longu hevur tryggjað sær rættin at spæla um eitt pláss í 1. deild, og B71 skal tapta heilt nógv, samstundis sum LÍF skal vinna heilt nógv í Vági, áðrenn strikan kemur upp á tal á Sandi.

Hesar seinastu ferðirnar hevur Piotr Krakowski nýtt seinnapartarnar leygardagar á B71 beinkinum. Tað gjørdi hann eisini á Toftum. Hann og øll hini sóu heimaliðið eiga besta møguleikan undan steðginum. Aksel Højgaard stútaði, bólturin brast í tværtræið aftanfyri Valdemar Novicki, men hann fór ikki inn um strikuna.

B71 hevði bara sandoyingar á liðnum – íroknað málverjan. Helmingurin av liðnum vóru dreingir frá 20 árum og niður í 16. Eftir steðgin fór miðalaldurin eitt sindur upp. Umframt veteranarnar Valdemar og Eli Hentze var tá eisini Páll á Reynatúgvu á liðnum.

Jónsvein Thomsen setti hol á, tá hann í 58. minutti setti høvdið undir innlegg úr høgru frá Kára Nielsen. Fimm minuttir seinni var tað Tummas Pauli Olsen sum úr spískum í høgru smekkaði inn við nærra stólpanum. Og tríggjar minuttir aftaná var tað Jónsvein Thomsen, sum hálvfluktaði í málið eftir útspark frá sínum egna málverja. Almannaráðharrin brúkti høvdið, tá ið tað restaðu tíggju minuttir. Hann setti krúllin undir innlegg – tað kom úr høgru!

Merkisvert var tað, at bæði B68 málverjin, Olaf Magnussen, og spælandi venjarin, Aksel Højgaard, áttu ein son á liðnum – ávikavíst Ova Magnussen og Jóhan Dávur Højgaard. Umframt teir báðar nevndu veteranarnar, so var Edmund Jacobsen veteranur á B68 liðnum. Allir hinir vóru í góðum fótbóltsárum og eiga at hava møguleika at vera við í kappingini um plássini á besta liðnum – um teir leggja tað fyri, sum skal til.

### 2. deild

**B68–B71 0–4 (0–0)**
0–1: Jónsvein Thomsen 58.
0–2: Tummas Pauli Olsen 63.
0–3: Jónsvein Thomsen 66.
0–4: Páll á Reynatúgvu 80.